# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Um Skotland vinnur 1-0 á Toftum, so skulu vit vera sera fegnir*

*Andy Watson, hjálparvenjari hjá Skotlandi*

# Sólbrillur til Svangaskarð



*Talan verður um framúr summarveður, nú skotsk innrás verður í Føroyum komandi dagarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Veðurmenninir siga blikalogn og upp í 16 hitastig, tá Føroyar spæla móti Skotlandi í morgin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Vit eru í juni mánaði, og hesin er ofta góður í Føroyum. Beint nú liggur eitt hátrýst eisini yvir okkum, og tað gevur bæði stilt og støðugt veður, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur um forsøgnirnar til mikukvøldið, tá landsdystur er á skránni.

Og sum veðurkortið sær út, so ivast Petur ikki í, at talan verður um fínan sólskinsdag á Svangaskarði.

- Nakað av mjørka er, men hesin er bert um náttina, tá luftin kølnar. Út á dagin er hesin burtur. Kanska talan verður um eitt lítið sindur av sirmi, men hetta skuldi á ongan hátt bilað. Og skal eg velja, so vildi eg heldur havt sólbrillur enn regnskjól, sigur hann.

Og hitin í morgin verður heilt nógvur. Upp í heili 16 stig verður sagt. So er einasti spurningurin, hvørt Rógvi Jacobsen og liðfelaganir økja hesi til 17 ella kanska 19!

## 1.500 atgongumerki eftir

**Í morgin klokkan 13 byrjar sølan av seinastu atgongumerkjunum til dystin á Svangaskarði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru fleiri lutir, sum tala fyri, at tað verður fullsett kring Svangaskarð týsdagin.

Ítróttarliga man tað hava heilt nógv at siga, at avrikini hjá landsliðnum hava verið stak góð seinastu ferðirnar. At talan er um heimadyst móti skotum ger neyvan vónirnar verri, og við bjartari veðurforsøgn kann væl verða, at áhugin økist eitt fitt petti afturat.

Hjá mótstøðuliðinum er í øllum førum veldugur áhugi fyri dystinum. Skotsku áskoðararnir verða millum 800 og 1.000 í tali, men tað eru eingi útlit fyri, at hesir einsamallir sleppa at herseta Svangaskarð. Av teimum 4.000 plássunum, sum eru eftir til dystin, eru enn 1.500 atgongumerki eftir. Klokkan 13 verður byrjað at selja hesi, og hjá FSF vóna tey, at fólk vilja nýta høvi at keypa sær atgongumerki í góðari tíð. Ikki minst tí farturin hjá Smyrli væl kann gera, at trýstið á atgongumerkjasøluna verður heilt stórt seinasta tíman undan dystarbyrjan.

## SkySport ásetur klokkutíðina

**Dysturin í Føroyum má víkja fyri útidystinum hjá Onglandi í Estlandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Upprinaliga var ásetingin, at dysturin á Svangaskarði skuldi spælast klokkan 19, og tað er eisini hetta, sum framgongur av plakatunum, sum FSF hevur sent út undan dystinum.

Orsøkin til, at hetta síðani er broytt til klokkan 17.15 er, at SkySports hevur keypt rættindini til dystin.

- Fyri at SkySports skuldi keypa dystin frá SportsFive, sum vit hava selt rættindini til, var tó neyðugt, at dysturin skuldi flytast. Hetta tí Ongland spælir í Estlandi mikukvøldið, og tann dysturin byrjar klokkan 19.30, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

- Formliga er eingin trupulleiki í hesum, so leingi sum hetta verður fráboðað UEFA innan evstamark hjá teimum. Men vit hildu tað vera ikki annað enn rímiligt, at FSF fekk ein bita av køkuni, um SportsFive á hendan hátt forvinnur fleiri milliónir eyka. Og vit hava samrátt okkum til eina loysn á hesum, sigur Ísak Mikladal.

## Nógvar útskiftingar

Tá ið Føroyar 2. september í fjør taptu 6-0 í Glasgow var tað annar tennissekkurin innan tvær vikur. 16. august hevði Georgia vunnið 6-0 á Svangaskarði.

Seks spælarar, sum eru við til at manna landsliðið hesa ferð, vóru ikki í 18 manna hópinum í Glasgow 2. september í fjør. Tá var føroyska liðið soleiðis mannað: Jákup Mikkelsen – Jákup á Borg, Atli Danielsen, Óli Johannesen, Janus M. Joensen – Julian Johnsson (Símun Samuelsen, 76.), Fróði Benjaminsen, Pauli G. Hansen, Rógvi Jacobsen (Kári Nielsen, 84.), Jónhard Frederiksberg (Hanus Thorleifson, 60.) – Christian Høgni Jacobsen

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Meinhardt Joensen, Claus Bech Jørgensen, Hans Pauli Samuelsen og Vagnur Mohr Mortensen.

Tað er ikki altíð einstøku spælararnar, sum tað snýr seg um. Tað ræður um at finna røttu samansetingarnar og røttu javnvágina ímóti einstaka mótstøðuliðnum. Leygarkvøldið vísti, at ímóti Italia var talan um topptrimmað føroyskt lið.

Nú er spurningurin, hvussu tað verður ímóti Skotlandi. Eftir glæsiliga avrikið ímóti Italia eru fyritreytirnar á so mangan hátt øðrvísi, enn tær vóru í september í Glasgow, tá ið liðið var illa sølað eftir stórtap á heimavølli ímóti Georgia.

**-mørk**